# Dagrøktarar
## til Leirvíkar kommunu

Dagrøktarskipanin í Leirvíkar kommunu søkir eftir dagrøktarum, at byrja 7. august 2006 ella eftir nærri avtalu.

**Vit ynskja at tú**
- Hevur góðar umstøður at hava børn bæði inni og uttanfyri
- Tekur ábyrgd og kanst arbeiða sjálvstøðugt.
- Vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- Ert álítandi og hevur góð samstrvsevni
- Ert tolin og vísir umsorgan
- Hevur hegni og áhuga í at menna børnini
- Dugir at síggja møguleikar í staðin fyri forðingar

Í dagrøktarskipanini starvast 8 dagrøktarar og ein leiðari. Talið av børnum í dagrøktini er 40. Ein fastan dag um vikuna eru 3 dagrøktarar saman við børnunum í spælistovuni og 1,5 tíma um vikuna eru allir dagrøktarnir við børnunum í fimleikarhøllini. Arbeiðstíðin er ímillum 7.30 - 17.15. Lønin er sambært sáttmála við FA, 1/3 av hesum er skattafrítt.

Nærri fæst at vita um starvið við at ringja tlf. 443251 og tosa við Marion Leifsdóttir, dagrøktarleiðara.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. juni 2006 kl. 12.00.

Vinarliga send umsókn tygara til

**Leirvíkar kommuna**
Dagrøktarskipanin
Postboks 42
520 Leirvík

# Lærarastørv í Leirvíkar skúla

**Søkt verður eftir 1 lærara skúlaárið 2006/07.**

**Starvið er fulla tíð, og er vegna lærara í farloyvi.**

**Søkt verður eftir lærara, sum**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skal undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans.
- Dugir at samstarva og er fyrikomandi
- Er fúsur at taka á seg tær uppgávur, sum eru í skúlanum

**Vit vænta, at tú ert**
- Fyrikomandi, umhyggin og engasjerað/ur
- Virkisfús/ur og hugað/ur fyri toymissamstarvi
- Í samstarvi við leiðsluna og starvsfelagar vilt vera við til áhaldandi at menna skúlan.

**Harumframt skulu lærararnir hava førleika at undirvísa í onkrum av hesum lærugreinum:**
Støddfrøði, alisfrøði, kristni og søgu/samtíð.

**Førleikakrøv**
Læraraútbúgving og linjulestur í onkrari av nevndu lærugreinum.

Royndir í føroyska fólkaskúlanum.

Læraralesandi, sum taka prógv í summar kunnu eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir:**
Starvið verður lønt í lønarflokki 18.1-27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

**Umsóknir**
Umsóknir við c.v., avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera fyrstalæraranum, Fríðfinni Johnsson, í hendi í seinasta lagi 23. juni 2006, kl. 18.00.

Áhugað kunnu venda sær til Leirvíkar skúla, tlf. 443234 ella 743234 og spyrja eftir Fríðfinni Johnsson.

NB Tey, sum fyrr í ár hava søkt starv í Leirvíkar skúla, kunnu boða frá, at tey eisini søkja hetta starvið. Teldupostur fj1308e9@skulin.fo

Leirvíkar skúli hevur komandi ár uml. 90 næmingar og 8 lærarar. Skúlin er ikki árgangsbýttur í øllum árgangum.
Tú kanst lesa meir um skúlan á heimasíðuni www.skulin.fo/lei



SEV

# MASKINMEISTARI søkist til Elfelagið SEV

Eitt fast starv sum maskinmeistari á Fossáverkinum í Vestmanna er leyst at søkja til setan frá umleið august 2006.

**Starvið:**
Maskinmeistaraarbeiðið umfatar rakstur og hald av Fossáverkinum, bæði sum dagarbeiði og sum vaktarbeiði uttanfyri vanliga arbeiðstíð.

Undir Fossáverkinum hoyra eisini Mýru-, Heyga- og Eiðisverkið, sum eins og vatnturbinan á Strond verða stýrd frá Fossáverkinum. Talan er um tilsamans 7 vatnturbinuaggregat við einum samlaðum mátti upp á 28,4 MW og 4 vindmyllur upp á íalt 2 MW. Harafturat stýrir vakthavandi á Fossáverkinum býtið av framleiðsluni millum elverkini í meginøkinum, herundir eisini Sundsverkið og Strond (lastfordeiling). Eisini er vakthavandi á Fossá-verkinum koblingsleiðari fyri háspenningsanleggini í meginøkinum.

**Førleikakrøv:**
Kravt verður, at umsøkjararnir hava fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. víðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistaraskúlaprógv.

**Lønin:**
Starvið er lønt sambært 6. lønarflokk eftir sáttmála millum SEV og Maskinmeistarafelagið.
Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan.
Byrjunar- og endalønin í 6. lønarflokki er í løtuni netto ávikavist kr. 24.581,51 og kr. 26.288,56 um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavist kr. 3.072,69 og kr. 3.286,07 um mánaðin.

Umframt nevndu løn kann roknast við vaktargjøldum og møguliga av og á eisini úrtíðarløn.

**Umsóknir:**
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum verða send Elfelagnum SEV, Postrúm 319, FO-110 Tórshavn og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi fríggjadagin, tann 21. juli 2006.

**Nærri upplýsingar:**
Nærri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Pól Joensen, verksmeistara á Fossáverkinum ella til Berg Didriksen, deildarstjóra á Maskindeildini, báðir á telefon nr. 346800.

Elfelagið SEV

# TOR SHIPPING

**Søkt verður eftir maskinmeistarum**

Vegna økt virksemi og fleiri nýbygningar í gerð, verður søkt eftir maskinmeistarum til frálandaskip í Norðsjónum.

Søkt verður eftir royndum maskinmeistarum, helst við óavmarkaðum vinnubrævi.

Eisini kundi reiðaríðið havt áhuga fyri tveimum meistarum við hægstu maskinmeistaraútbúgving, men sum enn mangla siglingartíð, ið so kundu mynstra fyrstu tíðina, sum 2. meistarar.

Reiðaríðið er: SIMON MØKSTER SHIPPING A/S í Stavanger, sum byrjaði sítt virksemi í 1968, og sum í dag eigur og rekur 22 skip í frálandavinnuni, serliga standby -/og supply skip.

Tvey av skipunum eru undir føroyskum flaggi, og hini undir norskum.

Treytirnar eru 1/1 – ein mánað úti og ein mánað heima við fastari løn.

Skipini undir norskum flaggi sigla eftir norskum treytum, og tey, sum eru, og sum koma undir føroyskt flagg, sigla eftir føroyskum treytum – í hesum føri smbrt. sáttmála millum maskinmeistarafelagið og reiðarafelagið fyri farma-/og frálandaskip.

Áhugaði biðjast vinarliga um at senda umsøkn við avritum til:

**TOR SHIPPING**
Niels Finsensgøta 23
Box 1252
FO 110 Tórshavn
*Tlf. 35 85 31 · Fax. 35 85 30 · e-mail : torship@post.olivant.fo*

# Frá Fuglafjarðar býráð

Feløg og einstaklingar, sum hava ætlanir um at nýta fimleikarhøll skúlans vetrarhálvuna 2006-2007 verða biðin um at senda mentamálanevndini skrivliga umsókn í seinasta lagi fríggjadagin 23. juni 2006 kl. 15.00.

Fuglafjørður 12. juni 2006

**Fuglafjarðar býráð**
Mentamálanevndin

# Sólir til sølu



4 Ergoline Avantgarde sólir við øllum tilhoyri. Myntautomat og kremautomat fylgja eisini við, ca. 3-4 ára gamlar. Eru sum nýggjar

**Tlf. 533201**